Nú tódna›i ta› í toppinum

Sumbingar hava fingi› fer› á, og nú kunnu teir á nor›oyarstevnu punktera meistararnar frá í fjør, sum vóru teir fyrstu, i› punktera›u B36

B68 vann grannauppger›ina ímóti NSÍ sunnudagin á Toftum

Fyri øll onnur enn tey, sum halda vi› B36, mundi ta› koma væl vi›, at KÍ sunnudagin megna›i at fara úr Gundadali vi› øllum trimum stigunum. At B36 ikki fekk stig, og at bæ›i B68 og HB vunnu, hev›i vi› sær, at munurin millum tey bestu og næstbestu minka›i.

Vit hava sagt ta› á›ur, og vit kunnu endurtaka ta›, at tá tr‡ stig vera latin fyri at vinna, so kann ta› vera so skjótt, at ta›, sum eftir fyrsta tri›ingin vendir ni›ur, kann venda upp, tá kappingin ver›ur li›ug sí›st í september.

Sjálvandi høvdu teir í B36 rokna› vi›, at teir eina fer› fóru at missa stig. Spurningurin er, hvussu teir fara at standa seg, nú teir hava tapt í fjór›ingsfinaluni í steypakappingini og teir í næsta dystinum hava tapt í landskappingini.

Skráin hjá B36 tykist vera torfør næstu vikurnar. Komandi sunnudag skulu teir spæla í Runavík móti einum svongum NSÍ li›i, sum ikki hevur vunni› sí›ani í fyrsta umfarinum (1–0 í Klaksvík), og annan leygardag skal B36 spæla í Gundadali móti HB. Ta› vóru grannarnir hjá B36 sum næstsí›sta sunnudag syrgdu fyri, at vónin brast hjá B36 at vinna steypakappingina.

Tá HB í fjør seldi Allan Mørkøre til ÍBV í Vestmannaoyggjunum, sást ta› aftur í úrtøkuni. Teir seinastu fjúrtan dagarnar hevur ta› ofta veri› at hoyrt, at ta› fór at ganga út yvir úrslitini hjá B36, at teir hava lati› John Petersen fari› til Íslands. B36 hev›i einki val, tí sáttmálatí›arskei›i› hjá John var li›ugt, og tær næstu vikurnar fara at vísa, um krónurnar, sum B36 fekk fyri John Petersen, vóru d‡rt keyptar.

Teir hanga uppií

Toftamenn eru næstfremstir, og aftaná teir koma teir í HB. Júst hesi bæ›i li›ini hittast í Gundadali komandi sunnudag. Ta› hevur fleiri fer›ir veri› tiki› til, at B68 hevur ov fáar spælarar, sum eru førir fyri at spæla í 1. deild. Teir arbei›a vi› at gera naka› vi› hetta á Svangaskar›i.

Avriki› móti NSÍ vísti, at teir fyrstu ellivu hjá B68 eru hollir. Í gjárkvøldi› fór Fró›i Benjaminsen at venja aftur, og ta› er ikki at undrast á, at teir í B68 síggja seg hava ein møguleika í Gundadali.

HB hevur ta› stríggi›. Hósdagin skulu teir spæla fyrru hálvfinaluna í steypakappingini, sunnudagin skulu teir spæla móti B68, annan mikudag skulu teir vestur í Vágar at spæla útsetta dystin, og annan leygardag skulu teir spæla móti B36.

At ta› aftur hesa fer› eydna›ist HB at vinna ein tættan dyst, ber bo› um, at HB hevur gott tak á tí. Teir hava uttan stórvegis dikkedar megna› at samanspælt eitt n‡tt li›, og ta› er líti› at ivast í, at teir fara at vera heilt frammarlaga, tá kappingarári› ver›ur endaliga gjørt upp.

GÍ og VB hava veri› næst teimum á hei›ursmerkjaplássunum. Nú hava teir fingi› KÍ afturat sær.

Gøtumenn mugu eftir tapi› móti HB sanna, at tøttu dystirnir, sum í gullárunum koppa›u teimum til fyrimunar, nú fara hinvegin vi›hvørt. Um ta› er onkur, sum droymir um ein ungan og ferman álopsmann av tí slagnum, sum Símun Petur Justinussen var, tá hann var uppá ta› besta, so er einki at undrast á ta›.

Vágbingar hava higartil spilt seg burtur í oddastrí›num vi› at tapa á heimavølli móti B71 og at hálvkiksa í Vágum. Komandi sunnudag skal GÍ til Vágs, og ta› li›i›, sum tapir ta uppger›ina, gleppur í fyrstu atløgu burtur ímillum.

Bæ›i VB og GÍ skulu spæla hálvfinalu i steypakappingini hósdagin.

Ikki púra sørir

Hvussu ta› fer at gangast hjá klaksvíkingum er framvegis púra opi›. Sjálvsagt er lagi› væl betri, nú KÍ fekk tr‡ stig í Gundadali. Tapi› í fjór›ingsfinaluni í steypakappingini nívir, men gongdin í landskappingini tríggjar tær seinastu fer›irnar bo›ar ikki frá akuttari kreppu.

Javnleikur á útivølli móti GÍ, sigur á heimavølli móti B68 og sigur í Gundadali móti B36 eru gó› úrslit. Mikukvøldi› hugdu KÍ spælararnir og ábyrgdarmenninir í felag at europeisku meistarafinaluni, og tosi› um at skifta venjara er køvt – í fyrstu atløgu í hvussu so er.

Næsta uppgávan er sumbingar á nor›oyarstevnu. Ta› minnir ikki sørt á 1995. Ta fer›ina stó› KÍ seg avbera væl í Europa Cup á Svangaskar›i mitt í viku, men so taptu teir 2–1, tá Sumba/VB í vikuskiftinum kom til Klaksvíkar.

HB vísti gott spæl ímóti GÍ í Gøtu sunnudagin

Sama tal av sigrum

Í fjør fingu sumbingar ellivu stig. Teir vunnu tveir dystir. Bá›ir vóru móti VB. Longu nú hava sumbingar vunni› tvær fer›ir, og hvørga fer›ina hevur VB veri› mótstø›uli›i›.

Talan hevur veri› um lykladystir móti FS Vágum og B71. Sumbingar vita, nær ta› er t‡dningarmiki› at leggja alla orku í. Longu undan stórtapinum í Gundadali móti B36 ljó›a›i, at ta› var ikki tann dysturin, sum var tann mest t‡dningarmikli, men heldur teir bá›ir, sum komu aftaná.

Einki er at ivast í, at sumbingar, sum nú munnu hava fingi› bló› á tonna, fara at leggja nógv fyri í Klaksvík. Men ta› skuldi ikki undra, um teir longu eru farnir at mi›ja eftir tveimum teimum næstu dystunum har su›uri. Hin fyrri er á heimavølli móti NSÍ, og hin seinni er á jóansøku í Vági. Og so er spurningurin, hvussu leingi Sumba fer at hava Sasa í hópinum. Arbei›sma›urin á Kósini í Klaksvík hevur tey bæ›i sí›stu umførini skora› tey bæ›i málini, sum Sumba hevur fingi›. Málini hava bori› seks stig vi› sær, og ta› skuldi ikki undra, um okkurt felag, sum liggur eitt sindur høgligari at arbei›splássinum enn Sumba ger, fer at trola eftir álopsmanninum.

Botnurin

Sandoyingar høvdu vóna› fyri a›ru fer› at fingi› fulla úrtøku vi› úr Su›uroy. Hesa fer› eydna›ist ta› ikki. Sandoyingar tola illa at spæla uttan Eli Hentze.

Veteranurin ver›ur vi› aftur, tá meiri ella minni lagnudystur er á skránni komandi sunnudag. Tá koma vágamenn at vitja, og ta› er serliga fyri FS Vágar at nógv stendur uppá spæl.

FS Vágar var á odda í Sørvági móti VB, men teir megna›u ikki at halda tørn. FS Vágar er einasta li›i›, sum enn ikki hevur vunni›, og um teir tapa á Sandi ver›ur ta› sera tungt hjá teimum.

FS Vágar skal spæla strævna hálvfinalu í steypakappingini hósdagin. Ta› skulu sandoyingar ikki.

jh

Fyrst hetja sí›ani bartrog

Líti› korter fyri dystarenda javna›i Súni Olsen fyri GÍ móti HB, men minni enn eitt minutt seinni var› hann sendur av vølli fyri hevnisøku. HB fekk størri rásarúm, fóta›i sær og vann vi› vøkrum frísparksmáli

SVEINUR TRÓNDARSON

GÍ — HB 1-2 (0-1)
1-0 Jón Rói Jacobsen 4.
1-1 Súni Olsen 32.
1-2 Pætur Dahl 43.

HB vann dystin í Gøtu sunnudagin, og skuldi nakar vinnari finnast, so var HB rætta li›i›. Teir høvdu meira at bjó›a upp á enn GÍ. At so Suni Olsen vi› sínum illa umhugsa›a albógva móti andlitinum á Rúna Nolsøe, gjørdi ta› lættari fyri HB, er so ein partur av søguni.

Satt at siga var dysturin í Sarpuger›i í dag eitt vónbrot. Máli›, sum HB fekk tí›liga í dystinum, tók beinini undan GÍ, sum ikki fóta›i sær fyrr enn langt inn í fyrra hálvleik. Í seinna hálvleiki var spæli› heldur betri, men kortini var ongantí› talan um nakran gó›an dyst.

Sunvard d‡rur

Lassin Isaksen hev›i gott og væl sett dystin í Gøtu í gongd, tá havnarmenn fingu naka› at fegnast um. Ein bóltur var› sendur móti málinum, sum Sunvard ikki megna›i at halda. Bólturin datt fyri føturnar á Jón Róa Jacobsen, sum ikki iva›ist, og so var HB á odda 1-0.

Talan var um eitt dropp av teimum stóru, og ta› er eingin ivi um, at Sunvard ver›ur noyddur at taka máli› upp á sín kappa.

Um ta› var skelkurin av málinum, sum gjørdi, at GÍ ikki kom fyri seg, er ikki gott at vita, men veruleikin er, at meginparturin av fyrra hálvleiki var› brúktur til at sparka bólt, heldur enn at spæla bólt. Ikki fyrr enn ímóti endanum av fyrra hálvleiki fekk GÍ rímiligt skil á spælinum afturi á vøllinum. Har frammi vóru teir líti› vandamiklir.

Spæli› hjá HB var líti› mætari, tí ta› gekk meiri enn strilti› at fáa naka› skilagott burturúr álopsspælinum. Einu fer›ina var tó líka vi›, men málskjúttin, Jón Rói, var ikki nóg kaldur, í avgerandi løtu.

Rumenski mi›vallarleikarin, Gigi, hev›i eisini ein møguleika í fyrra hálvleiki, men vinkulin var spískur, og tí spurdist einki burturúr tí møguleikanum. Kortini skal Gigi eiga ta› rós hann hevur uppibori› fyri ein framúr gó›an arbei›svilja. Hann var allasta›ni og er ein sannur fongur fyri HB.

GÍ betri vi›

Tá seinni hálvleikur byrja›i sást, at GÍ hev›i fingi› bo› um at leggja størri tr‡st á HB. Teir vóru nógv meira uppsettir enn teir vóru í fyrra hálvleiki, og teir ota›u seg longur fram á vøllin.

Kortini gav hetta ikki stórvegis úrslit, tí tá teir nærka›ust trevja›i HB verjan spæli› upp. Teir høvdu kanska lættari arbei›i enn ney›ugt, tí spæli› hjá gøtumonnum var í so einfalt. Ikki tí, gøtumenn royndu at byggja upp um kantarnar, men ta› vildi ikki, sum teir sjálvir vildu. Tá bólturin var› spældur innfyri, var eingin at taka ímóti, um bólturin í heila tiki kom innfyri.

Men brádliga bragda›i. Tá gó›ir tríati minurttir vóru leiktir av seinna hálvleiki fekk GÍ eitt innkast í høgra bori›. Bólutin var› tveittur langt inn í brotsteigin, har ein HB-verjuleikari fekk krúllin á. Bólturin enda›i hjá Súna Olsen, sum royndi tvær fer›ir á›renn ta› eydna›ist.

Ta› eydna›ist ikki ofta hjá Óla Hansen at sleppa framvi› HB verjuni

So var 1-1 og nú vænta›u tey flestu, at GÍ fór at seta seg á dystin. Men gle›in var stokkut.

Súni sá reytt

Stutt eftir at GÍ hev›i javna›, bardi Súni Olsen seg til bóltin á mi›juni. Hann tro›ka›i seg – lógliga – til bóltin, men ta› vildi Rúni Nolsøe ikki lata sær lynda. Hann tók í Súna og helt fast. Tá var ta›, at Súni svinga›i albogan móti Rúna, sum leg›i seg alt fyri eitt. Um hann var› raktur ella ikki, skal vera ósagt, men ger›in var til eitt reytt kort, og ta› fekk hann.

Hinvegin er spurningurin um Lassin Isaksen ikki gjørdi ein feil vi› at lata Rúna sleppa snikkaleysan. Hann for›a›i Súna at sleppa avsta› vi› bóltinum, og rættast hev›i uttan iva veri› at givi› honum gula korti› fyri ta›.

Ger›ina hjá Súna skal einki sigast um, uttan ta›, at hann var hetja ta einu løtuna, fyri at ver›a bartrog løtuna eftir.

Vi› útvísingini misti GÍ taki á HB, sum eftir stuttari løtu bardi seg innaftur í dystin.

Og Rúni var ikki li›ugur enn. Tríggjar minuttir fyri leiklok vann hann HB fríspark beint uttanfyri GÍ brotsteigin. Gøtumenn settu upp múr, men ta› leg›i innskifti Pætur Dahl líti› í. Hann medda›i eftir málinum, og sendi bóltin beina lei› í meskarnar og so var HB aftur á odda, og hesafer› helt lei›slan.

Samanumtiki› kann sigast, at HB vann ein ikki serliga væl leiktan dyst, sum fyri ta› mesta gekk fyri seg á mi›juni, uttan teir heilt stóru vandamiklu møguleikarnar. Av teimum, sum vóru átti HB teir flestu, og tí var ta› á gó›ari lei›, at havnarmenninir vóru avsta› vi› stigunum.

Avger›in ver›ur tikin í kvøld

Kappingarnevndin skal á fundi í kvøld taka stø›u til, hvussu KÍ skal sektast, tí ein ásko›ari gjørdi seg inn á linjuverja

Kappingarnevndin hjá Fótbóltssambandinum hevur fund í kvøld. Millum málini, sum eru á skránni, er spurningurin, um KÍ skal sektast, tí ein ásko›ari gjørdi seg inn á annan linjuverjan, tá B68 og KÍ spældu landskappingardyst d‡ra bi›judag.

Oddmar Andreasen, dómari, sendi frágrei›ing um tilbur›in til FSF saman vi› dómarase›linum. Sambært ásetingunum sendi FSF spurningin til KÍ, sum var bi›i› um at koma vi› vi›merkingum til máli›. Vit skilja á lagnum, at klaksvíkingar hava svara› FSF, og nú er ta› so upp til kappingarnevndina at taka stø›u.

Í bla›num sí›sta t‡sdag vístu vit á okkurt dømi, har óláta›ur atbur›ur hjá ásko›arum móti dómara ella linjuverja hevur havt vi› sær, at heimali›i› hevur spælt heimadystir á uttanvelta›um vølli.

Vit kundu lagt afturat, at a›ra sta›ni kemur ta› ofta fyri, at heimali›ini í førum, tá ásko›ararnir ikki halda seg innanfyri teir karmar, sum teir skulu gera, vera áløgd stórar bøtur.

Í kvøld fáa vit so at vita, hvat kappingarnevndin heldur um henda spurningin. Næsti heimadysturin hjá KÍ ver›ur komandi sunnudag. Tá skulu teir á nor›oyarstevnu spæla móti sumbingum.

Um KÍ ikki vil gó›taka ni›urstø›una, sum kappingarnevndin kemur til, so hava teir møguleika at leggja máli› fyri dómsnevndina at taka stø›u til.

jh